Grýludansur við Hjarnum á Kambsdali

»Kom og Dansa« skipar fyri einum øðrvísi kvøld á Kambsdali, har rock'n'roll-dansur verður framførdur, Hjarnar spæla til dans, »Ársins grýla '94« verður kosin og føroyskir »Chippendales« fara at hava eitt show...

Aftur í ár fer »Kom og Dansa« at skipa fyri einum spennandi og øðrvísi tiltaki í ítróttarhøllini á Kambsdali. Hetta verður fríggjakvøldið, tá »Kom og Dansa« hevur grýludans og ymist annað á skránni.

Teir so vælumtóktu rock'n'roll-dansararnir fara at seta futt í við at framføra ymist gott fyri eyga, og annars fer bólkurin Hjarnar at spæla til dans.

Skulu kjósa »Ársins Grýlu«

Eftir midnátt verður »Ársins grýla '94« kosin, og verður tað sjálvandi grýlan við tí besta hugflognum. Vinnandi grýlan fær 1.000 krónur fyri heiðurin.

– Tað ræður um at fara upp á ovastaloft og finna okkurt spennandi at fara í, ella eisini kann ein seta seg við seymimaskinuni og nýta hugflogið, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

– Men tað er sjálvandi ikki ein treyt, at ein er grýlukleddur, og øll eru vælkomin.

Sum nakað nýtt og spennandi, fara nakrir føroyskir »Chippendales« at royna seg við einum showi, ið verður spennandi at síggja.

Seta borð upp

Borð verða sett upp, so fólk kunnu fáa sær eitt prát millum dansirnar og høllin verður eisini prýdd við føstulávintsskreyti og gjørd so hugnaligt sum gjørligt.

Eitt møguligt yvirskot av tiltakinum fer til rakstur av felagnum »Kom og Dansa«, ið nú hevur nøkur ár á baki. Gjøgnum tíðina hava yvir 1.500 fólk verið á dansiskeiði og lært seg at dansa rock'n'roll. Í huganum, tá nytta skal fáast burtur úr einum møguligum yvirskoti, er útbúgving av einum rock'n'roll-instruktøri.

Tá »Kom og Dansa« í fjør skipaði fyri einum líknandi føstulávintstiltaki á Kambsdali, vóru heili 600 fólk við, og vóna fyrireikararnir sjálvandi, at í minsta lagi so nógv verða við aftur hesaferð.

hj.


BILLUTIR!

Vit hava viðkað okkara útboð av øykalutum til bilar og hava nú fleiri útstoyt enn nakrantíð á goymslu.

Tað loysir seg altíð at handla við okkum.

p/f Esmar Simonsen
KAMBSDALUR, Box 78, FR-530 Fuglafjørður
Tlf. 44405, Fax. 44629

Lívdin, Dj. í Geilsgøtu 1
Nú er opið soleiðis:
fríggjakvøld og leygarkvøld frá kl. 19.00 til 01.00,
og sunnukvøld frá kl. 19.00 til 23.00.
Frá 1. januar er aldursmarkið 16 ár.



Viðmerking

Út av lagi vánalig bakteriologisk góðska. Tað sum vit serliga leggja merki til, er tað sera høga innihaldið av Bacillus cereus. Henda bakteria kann gera eiturevni, sum eru heilsuskaðiligt. Okkurt av hesum virkar á tann hátt, at tey sum fáa tað í seg fáa sterka pínu í búkin og skræpusótt. Hetta vóru millum annað sjúkueyðkennini hjá teimum trimum fólkunum, sum høvdu etið av høsnarungunum. Vit meta, at City við hesum hevur brotið matvørulógina við at selja heilsuskaðiligan mat.

Váttað : Marjun Hanusardóttir

Viðmerkingin frá Heilsufrøðiligu Starvsstovunt til kanningina av matleivdunum, tá trý fólk og ein hundur løgdust sjúk av at hava etið høsnarunga, tey høvdu keypt frá grillbarrini City. Orðingin í viðmerkingini eru ikki at fara skeivur av

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN KANNAR ALT, SUM KANN HAVA ÁHUGA

Tey trý fólkini og hundurin, ið høvdu etið høsnarunga frá City við høgum bakteriuinnihaldi, eru framvegis sjúk

Leygardagin skrivaði Tíðindablaðið Sosialurin um trý fólk og ein hund, ið løgdust sjúk, eftir at tey fríggjakvøldið fyri yvir einari viku síðani høvdu etið tríggjar høsnarungar við chips frá grillbarrini City í Havn.

Matleivdir av høsnarungunum vórðu latnar Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til kanningar, ið longu vórðu gjørdar dagin eftir, eftir at matleivdirnar høvdu verið goymdar í køliskápi um náttina.

Hesar kanningar vístu, at maturin var fullur av skaðiligum bakterium, ið vóru orsøk til, at tey trý fólkini og hundurin løgdust sjúk aftaná at hava etið.

Viðmerkingin til kanningina, ið Heilsufrøðiligu Starvsstovan setti niðast á kanningarskjalinum, sigur heilt greitt, at í matleivdunum vórðu funnar stórar nøgdir av bakteriuni Bacillus cereus, ið kann gera eiturevni, ið eru heilsuskaðilig.

– Okkurt av hesum virkar á tann hátt, at tey sum fáa tað í seg fáa sterka pínu í búkin og skræpusótt, sigur viðmerkingin.

Júst hesi sjúkueyðkenni vóru til staðar hjá fólkunum, ið høvdu etið høsnarungarnar.

Viðmerkingin er váttað av leiðaranum fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Marjun Hanusardóttir.

Elga at kanna slíkar tilburðir

Í Tíðindablaðnum Sosialinum leygardagin sigur eigarin av City, Rigmor Andreasen, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan als ikki kann taka matleivdir uttanífrá og brúka tær til slíkar kanningar. – Konan, ið hevur boðað frá tilburðinum, kann jú saktans sjálv hava borið so at, at bakteriur eru komnar í høsnarungarnar, segði hon.

Øllum hesum vísir Marjun Hanusardóttir í dag aftur:

– Vit eiga so absolutt at fara út og taka royndir, tá fólk boða frá slíkum tilburðum sum hesum, har vandi er fyri mateitran. Tað er heilt einfalt skylda okkara at gera tað, sigur hon.

– Og vit fingu fráboðan um tilburðin ein ella tveir tímar eftir at maturin varð keyptur, og longu dagin eftir vóru vit eftir leivdunum, ið eru kannaðar. Og sambært teimum, so má konan, ið hevur fráboðað tilburðin, vera mikrobiologur, um hon sjálv skal hava koyrt slíkar nøgdir av júst hesum bakteriunum, vit funnu, í høsnarungarnar. Hesar bakteriurnar kunnu als ikki vaksa so nógv eftir einari nátt, og tær vaksa yvirhøvur ikki í einum køliskápi.

Liggja enn sjúk

Tey trý fólkini og hundurin, talan er um, liggja enn sjúk av mateitranini, ið stavar frá høsnarungamáltíðini.

– Hetta kostað okkum tilsamans 657,70 krónur higartil í útreiðslum til heilvág og annað, sigur eitt av teimum sjúku fólkunum.

hj.



Tað var her, í grillbarrini City í Tórsgøtu í Havn, at tey trý fólkini keypu grillmatin, tey løgdust sjúk av

Trý fólk og ein hundur sjúk av høsnarungum

Trý fólk, sum fríggjakvøldið í farnu viku keyptu sær høsnarunga við chips í City í Havn, løgdust sjúk aftaná at hava etið. Eisini hundurin í húsinum, ið át burturav, legði sjúkur av matinum, ið vísti seg at vera fullur av skaðiligum bakterium. Fólkini og hundurin noydst at taka heilivág